## DAGSINS MEINING

# Kortbrúkarar til fortreð hjá bankunum?

Frá fyrsta januar er eitt gjald uppá 50 oyru lagt afturat hvørjum keypi við FR kortinum í føroyskum handlum. Bert ein peningastovnur er lagaligur við hesum gjaldi og kunnu stóru føroysku peningastvonarnir spegla sær í hesum. Bert spell at stóru handlarnir í miðstaðarøkinum ikki geva hesum størri ans. Hvat siga til dømis SMS og Keypsamtøkan?

Hví skal gjaldið verða júst 50 oyru? Í Danmark kunnu peningastovnarnir leggja upp til 50 oyru á hvørja flyting og løgið nokk, sæð frá einum kappingarsjónarmiði, so leggja allir danskir peningastovnar júst hesa upphædd á. Teir stóru føroysku peningastovnarnir gera so nummarið eftir. Hví ikki fría kapping? Um tann eini stóri føroyski peningastovnurin segði, at einki eykagjald skuldi verða á hesum, so høvdu kundarnir uttan iva streymað til hendan peningastovn, og hin hevði verið noyddur at fylgt eftir. Um ikki einki, so kundi kanska annar kundi lagt 25 oyru ístaðin fyri 50 oyru á. Vildi tað ikki verið eitt tekin um fría kapping?

Tað er undrunarvert, at tá nærum allir borgarar hava fingið sær plastkort, so verður eitt eykagjad lagt á, hóast hetta ivaleyst hevur spart peningastovnunum fyri nógvan pening í farnu árum.

Boðskapurin við einum eykagjaldi er, at teir kundar, ið brúka FR kortið dagliga, eru til fortreð hjá peningastovnunum. Som mikið nógv til fortreð, at eitt eykagjald verður lagt á brúkið av hesum - eftir øllum at døma fyri peningastovnarnar - irriterandi kortum.

Brúkarin eigur at vísa sína ónøgd við slíkar avtalur um eykagjald við at kanna alternativ. Er ein peningastovnur í Føroyum, ið ikki tekur hetta gjald frá teimum handlum, ið brúka teir, so eiga brúkarnir at spyrja handilin, har teir hava sína dagligu gongd, hví teir ikki finna bíligasta og bestu loysn fyri kundarnar. Eingin grund er til at lata stóru peningastovnarnir hvíla á laurberunum. Kappingin eigur at herðast, og eru tað brúkarnir, ið mugu leggja trýst á, fyri at hetta skal henda.

Er tíðin kanska komin til ein føroyskan banka afturat? Kanska er tíðin komin til at kanna kort aðrastaðni frá. Ì Stórabretlandi finnast kort, ið einki eykagjald hava. Hví skulu vit halda fast um eina danska dankortskipan, um hesar skipanir gerast so ineffektivar, at eykagjøld mugu leggjast á brúk av kortum?

Í samband við øllum tosinum um KT og innovatión, so ganga vit og tosa um, hvussu lætt tað er at royndarkoyra nýggjar KT-skipanir av ymsum slag í Føroyum, tí Føroyar eru so lítlar og tó framkomnar. Um hetta er rætt, so burdi verið lag á manni, at royndarkort okkurt annað plastkort enn dankortið, ið gerst ov dýrt - hjá brúkarnum í hvussu so er.

Vónandi er loysnin ikki, sum fyrr í tíðini, at fara í bankan einaferð um mánaðan at taka reiðan pening út til mánaðarforbrúkið. Vónandi taka peningastovnarnir sær um reiggj og avtaka eykagjaldið á brúk av korti í handlum. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tøkk fyri kjaksendingina - SvF

**Andrass Skaalum**

Týskvøldið var ein framúr góð kjaksending í SVF um samráðingarnar Føroya og Danmarkar millum um støðu Føroya framyvir.

Tøkk til SVF við vertinum Boða Godtfred og tøkk til Kára á Rógvu, Sjúrð Skaale og Bjørn á Heygum fyri eitt upplýsandi og sakligt orðaskiftið.

Tit megnaðu at geva lurtarunum gott innlit í týdningarmikla spurningin á einfaldan og greiða hátt, hetta eru vit ikki forvand við.

Tit skóru lætt og smidliga inn á bein, uttan spillandi goragang, sum vit tíverri ov tíðum fáa frá politikar-um.

Spell at politikarar, sum fyrr hava gramt seg um væntandi opinleika nú eru so tættir.

Tit vóru eitt frálíkt toymi.

# Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

TÍÐINDASKRIV

Triði fyrilesturin í røðini ‘Myndlar og tøl’, sum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri, verður hóskvøldið 6. januar, tá ið Øystein Patursson, Ph.D-studentur á University of New Hampshire í USA heldur fyrilesturin "Aliringar til harðbalin økir - um at menna aliútgerð". Fyrilesturin verður klokkan 20 í Ovastovu í Nóatúni 3.

Alingin í Føroyum vaks nógv fram til 2001. Øll aliøkini inni á firðum og sundum við spøkum ráki og lítlari aldu vóru í brúki, og neyðugt var tí at fara út á økir við harðari ráki og størri aldu. Royndirnar við hesum vóru misjavnar.

Í samband við verkætlanina "Útgerð til aling á streymasjógvi", ið var eitt samstarv millum netavirkið Vónina, Fiskirannsóknarstovuna og Náttúruvísindadeildina, vóru modellroyndir gjørdar í royndarbrunninum hjá Vónini í Fuglafirði í 2002 og 2003. Hesar vístu, at rúmdin í eini alinót minkar nógv við rákinum.

Við University of New Hampshire er eitt numeriskt model ment, sum sær út til at vera ført fyri at rokna skapið á alinótum í streymi og aldu umframt at rokna spenn í fortoyningum og línum. Nakrar simuleringar eru gjørdar við hesum modellinum, og úrslitini vera sýnd fram í fyrilestrinum.

Eisini eru mátingar gjørdar av skapinum á nótini á tveimum føroyskum alibrúkum. Hesar verða bornar saman við modellroyndirnar fyri at kanna hvussu væl modellini og simuleringarnar samsvara við veruleikan.

At enda verða nakrir tankar lagdir fram um, hvat skal havast í huga tá aliútgerð - serliga aliringar - skal mennast, og hvussu hetta eru nýtt í eini verkætlan á Funningsfirði.

Øystein Patursson er útbúgvin bachelor of science innan kolvetnisverkfrøði frá Fróðskaparsetri Føroya í 2002, og fór í 2003 undir Ph.D. lestur innan Ocean Engineering við University of New Hampshire í USA. Har verður hann væntandi liðugur í 2007. Ph.D. lesturin er fíggjaður av Statoil Færøyene AS og er partur av einum samstarvi millum Fróðskaparsetrið og University of New Hampshire.

**Skráin fyri fyrilestrarøðina er hendan:**

27. januar 2005
Uni K. Petersen: "Seismiskar kanningar á Glyvursnesi"
17. februar 2005
Knud Simonsen: "Streym til drív- og leitiskipanir á landgrunninum"
10. mars 2005
Trygvi Vestergaard: "Hvat anda vit?" - um úrslit frá luftkanningum í Føroyum
31. mars 2005
Bárður Niclassen: "Spæla alda og streymur saman á landgrunninum"
21. apríl 2005
Eyðfinn Magnussen: "Føroya Banki - eitt vakstrarparadís hjá fiski."



**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.